# Benzema vísti United aftur

Karem Benzema, sum í farnu viku skrivaði sáttmála við Real Madrid, avdúkar nú í enskum miðlum, at hann vísti tilboði frá Manchester United aftur. – Tað hevur altíð verið ein dreymur at umboða Real Madrid. Eg kundi valt Manchester United, men hetta er tað, sum eg av álvara vil. Eg kann ikki siga nei til at spæla saman við Kaká og Cristiano Ronaldo, sigur Karem Benzema.



# Forlan vil til Barcelona

Diego Forlan vil, sambært spanska blaðnum Sport, fegin spæla við Barcelona í komandi kappingarári. Tað er eingin loyna, at sponsku meistararnir ynskja sær ein framherja, og ætlanin er nú at fara undir samráðingar við Atletico Madrid, har Forlan hevur spælt seinnu árini. Diego Forlán var toppskjútti í La Primera Division í farna kappingarári. Hann skeyt í alt 33 mál.



Guðrið Syderbø fekk ikki bara gullmerki leygardagin, men kundi eisini fegnast um at sleppa á All Star-liðið sum besti libero í flogbóltskappingini hjá kvinnum á Oyggjaleikunum í Álandi

Mynd: Álvur Haraldsen

# Guðrið kosin besti libero

**Umframt at vinna gull saman við liðfeløgunum, kom Guðrið Syderbø eisini á All Star-liðið, sum var kosið á Oyggjaleikunum í Álandi. – Hetta er bara heilt ótrúligt, tí eg havi bara spælt libero í nakrar mánaðir, segði Guðrið ovurfegin eftir stóra heiðurin**

FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá oyggjaleikir vóru á Rhodos fyri tveimum árum síðani, var Guðrið Syderbø við sum áskoðari, tí ta ferðina var hon ikki funnin at vera nóg góð til liðið. Men hesa ferð var hon við, og tá alt endaði seinnapartin leygardagin, rakk hon ikki bara tindin sum gullvinnari saman við øllum hinum á føroyska kvinnulandsliðnum.

Meðan bíðað var eftir, at heiðursmerkini skuldu handast, fóru tey undir at almannakunngera, hvørjir spælarar yvir alla kappingina høvdu verið teir bestu. Ikki so løgið, at Saaremaa átti fleiri teirra, tí ávegis til finaluna hevði Saaremaa víst sína styrki fleiri ferðir.

Men brádliga ljóðaði navnið Guðrið Syderbø í hátalaranum, og hon var ikki sein at leypa upp í loft og renna fram at taka ímóti heiðrinum. At hetta var nakað, hon ikki hevði væntað, sást langan veg, og tað viðgekk hon eisini aftaná.

– Jamen, hetta er bara heilt fantastiskt, tí eg hevði so slett ikki væntað hetta. Hetta er bara heilt ótrúligt, tí eg havi bara spælt libero í nakrar mánaðir, segði Guðrið í gleðisrúsinum, ið – um møguligt – gjørdist uppaftur størri, tí hon bara eina løtu frammanundan hevði verið við til at vunnið gullið.

## Samanhaldið helt

Hinar á liðnum vóru heldur ikki seinar at fagna henni, og tað lýsti av teimum, at tær vóru fegnar hennara vegna og ernar av, at Føroyar eisini á All Star-liðnum kundu lýsa upp við einum umboði.

– At vit vinna gullið, er bara heilt fantastiskt, tí hetta er tað, vit hava arbeitt miðvíst fram ímóti við venjingum og landsdystum síðstu tríggjar mánaðirnar. Vit hava eitt øgiliga gott samanhald, og tað haldi eg, gjørdi munin, tá tað gekk ímóti fyrst í finaludystinum. Samanhaldið helt, tá alt sá út til at kiksa hjá okkum, og tí standa vit nú her við gullheiðursmerkinum um hálsin, segði Guðrið.

– Tá ringast stóð til eftir fyrsta sett og annað sett var byrjað so illa, fingu vit at vita frá venjarunum, at vit skuldu hugsa um teir góðu bóltarnar og um teir vunnu dystirnar, og tá blivu vit beinanvegin róligari. Nú eru vit bara so glaðar, og eg eri fantastiska glað fyri, at eg so oman á tað heila eisini var kosin besti libero. Hetta er fantastiskt!

# Størsta afturko

**Ongantíð áður hava vit sæð eina slíka afturkomu í flogbólti á oyggjaleikum, sum ta, føroysku flogbóltskvinnurnar framdu í finaluni ímóti Saaremaa leygardagin. Tað gjørdi finaluna so spennandi, sum tað var møguligt, umframt at júst afturkoman setti tjúkka striku undir gullið**



FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Lítið man vera at ivast í, at føroysku flogbóltskvinnurnar leygardagin skrivaðu eitt fitt petti av føroyskari flogbóltssøgu, tá tær vunnu ta mest dramatisku kvinnufinaluna á einum oyggjaleikum nakrantíð. Sálarliga vístu tær seg at vera sterkari enn Saaremaa, tá tað veruliga galt, og tað gjørdi avgerandi munin.

Dysturin byrjaði annars við nøkrum av tí ússaligasta, ið hevur verið at sæð, og Saaremaa vann – uttan at sveitta – ein sannførandi 25-12 sigur í fyrsta setti. Og tað sá eisini út til, at sigurin í øðrum setti fór at verða minst líka stórur, og eitt skifti var Saaremaa á odda 18-7!

Men so var tað, at vend kom í. Føroysku spælararnir fingu frá venjarunum at vita, at nú var at taka alt tað góða frá undanfarnum dystum við sær inn á vøllin og gloyma tað, sum var miseydnað. Hetta tóku spælararnir so bókstaviliga, at annað sett stig fyri stig var vent til føroyskan fyrimun, og høllin mundi kókað yvir, tá tað gjørdist 23-23. Og tveir bóltar seinni høvdu Føroyar vunnið 25-23!

Skelkurin stóð framvegis málaður í andlitunum á teimum hjá Saaremaa, tá farið var undir annað sett, og tað vunnu føroysku kvinnurnar eisini trygt, 25-18. Men í fjórða setti raknaði Saaremaa við aftur og dysturin var sera javnur. Føroyar høvdu sett- og matsjbólt við leiðsluni 24-23, men fingu ikki nakað burtur úr honum, og í staðin tók Saaremaa næstu tríggjar bóltarnar og streyk avstað við fjórða setti, 26-24.

# Hetta er tað besta

**Venjarin hjá flogbóltskvinnunum, Kristian Mikkelsen, visti ikki, hvørjum beini hann skuldi standa á, tá gullið var veruleiki, tí hetta var tað besta, hann hevði upplivað í flogbólti**

FLOGBÓLTUR

*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tað, sum fullkomuliga vendi kvinnufinaluni frá at gerast eitt skrædl til at enda sum sigur, byrjaði úti á bonkinum, har venjarin, Kristian Mikkelsen, saman við hjálparvenjaranum, Jóan Peturi á Stongum, legði eina ætlan fyri vendina, ið má sigast at vera sálarfrøði á hægsta stigi.

– Ja, vit royndu at brúka eitt sindur av sálarfrøði í øðrum setti, tá vit vóru aftanfyri við 10 stigum, og tað sá út til at rigga. Vit søgdu við spælararnar, at teir skuldu gloyma fyrsta sett og heldur hugsa um alt tað, sum hevði riggað og sum tær duga, og tað vísti seg eisini at geva úrslit. Vit fingu trúnna í spælararnar